Kommunufelagið

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting
9. juni 2023

Okkara j.nr.
23/02830-4

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
23/01932

Ummælisskriv viðv. uppskoti til løgtingslóg um Brekumboð

Kommunufelagið fekk hin 10. mai 2023 omanfyrinevnda uppskot til ummælis. Felagið hevur viðgjørt uppskotið á stýrisfundi 26. mai 2023 og hevur hesar viðmerkingar:

Kommunufelagið tekur undir við endamálinum

Nógvir batar hava tíbetur verið á brekøkinum seinnu árini. Á kommunala økinum er tað kanska serliga byggilógin og bygningskunngerðin, sum hava ført við sær batar í mun til fysiska atkomu í almennum bygningum. Enn er nakað á mál, men okkara greiða fatan er tann, at ongin kommunal nýbygging ella høvuðsumvæling fer fram uttan at atkoman til bygningin hevur høga raðfesting.

Kommunurnar hava eisini havt gleði av at felagsskapir á brekøkinum – sum fyri tað nógva virka sjálvboðið – geva sær stundir at vísa á batar í teimum verkætlanum, ið kommunurnar kring landið hava í hyggju at fremja í verki.
Hetta samstarvið hevur riggað væl og eigur at halda áfram. Vit seta okkum ikki ímóti at savna hesa vitan á einum stað, men tað má vera við tí greiðu fortreyt at verandi samstørv og innlit ikki fara fyri bakka.

Felagið ásannar samstundis, at viðurskiftini hjá okkara borgarum, ið bera brek, verða ávirkað av nógvum øðrum enn bert fysiskari atkomu. Tí kann tað vera skilagott at savna vitan á økinum og tryggja upplýsing um viðkomandi viðurskifti.
Hetta kann fremjast uppá fleiri ymiskar mátar, harímillum í samstarvi millum stóru almennu byggiharrarnar – kommunurnar og Landsverk – og við at styrkja sjálvbodnu kreftirnar í samfelagnum, sum longu hava vitanina.

Ein nýggjur almennur stovnur er tí ongin trygd í sær sjálvum fyri at fremja batar fyri okkara borgarum, ið bera brek.

Kommunufelagið

Skeivt og óneyðuga dýrt við sjálvstøðugum stovni

Uppskotið leggur upp til at virksemið hjá Brekumboðnum skal leggjast í ein nýggjan stovn; í ein sjálvstøðugan almennan myndugleika. Vit meta hetta vera eina skeiva og óneyðuga dýra loysn.

Rættindini hjá borgarum, ið bera brek, eru í stóran mun tryggjað við lóg ella við sáttmálum, sum almennu Føroyar hava bundið seg til at halda. Verða hesi rættindi ikki vird, tá hava vit longu ein vælvirkandi og virdan stovn, sum eigur at hava allar førleikar at vísa á hesi viðurskifti – nevniliga Løgtingsins Umboðsmann.

Tað tykist okkum upplagt at ein stórur partur av tí virksemi, sum Brekumboðið ætlandi skal takast við, eigur at kunna rúmast hjá Løgtingsins Umboðsmanni.
Møguliga krevur hetta smærri tillagingar í umboðsmanslógini, men tað eigur onki stórvegis at vera til hindurs fyri at stovnseta eitt brekumboð (ella uppgávurnar hjá brekumboðnum) hjá verandi umboðsmanni.
Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at tað ikki er ókent í londunum kring okkum, at umboðsmaðurin fær til uppgávu at raðfesta ávís øki. Til dømis varð í Danmark valt at gera eina skattaskrivstovu undir Fólkatingsins Umboðsmanni, heldur enn at stovnseta eitt nýtt Skattaumboð, sum annars var upprunaliga ætlanin.

Fíggjarliga hevur hetta harafturat tann fyrimun, at tað slepst undan at brúka óneyðuga orku uppá umsitingarligt arbeiði – orka, ið hevði farið burtur frá kjarnuuppgávunum hjá einum brekumboði. Hesir umsitingarligu førleikar eru longu til staðar hjá Løgtingsins Umboðsmanni. Harumframt hevur umboðsmaðurin drúgvar royndir við at gera ársfrágreiðingar um sítt virksemi – ein uppgáva, sum ein nýggjur stovnur ongar førleikar hevur til.
Verða uppgávurnar hjá brekumboðnum lagdar til Løgtingsins Umboðsmann er eisini trygd fyri tí fakliga grundarlagnum undir arbeiðnum. Harvið slepst undan at skipa eina nevnd fyri umboðið, ið harvið hevði havt við sær eina fíggjarliga og umsitingarliga sparing í mun til uppskotið.

Málviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum er harafturat rættiliga stutt, ið ber boð um eina góða umsitingarliga orku. Tí eigur at vera gjørligt at fremja eitt slíkt átak væl bíligari enn lagt er upp til við verandi uppskoti.

Viðurskifti hjá ætlaða brekumboðnum, sum ikki kunnu ella eiga at verða løgd til Løgtingsins Umboðsmann, kunnu uttan trupulleikar loftast av verandi myndugleikum og áhugafelagsskapum, t.d. í skipaðum myndugleikasamstarvi og við serstakari játtan á fíggjarlógini til ráðgevingarvirksemi innan brekøkið.

Kommunufelagið mælir tí frá at samtykkja uppskotið, men í staðin at lofta endamálinum í øðrum høpi.

Kommunufelagið

Viðmerkingar til uppskotið

Velur landsstýrið at halda fast í at skipa Brekumboðið sum sjálvstøðugan almennan myndugleika vil Kommunufelagið vísa á tvey viðurskifti, ið eiga at verða broytt.

Tað fyrra er samansetingin av nevndini fyri umboðið.
Kommunurnar eru næststørsti arbeiðsgevarin í Føroyum, umsita dagstovna- og eldraøkið, hava nógv borgarasamskifti og standa fyri stórum parti av tí bygging, ið so ella so er ætlað almennari nýtslu.
Eftir okkara tykki er tað tískil upplagt, at kommunurnar eiga at hava eitt fast umboð í nevndini fyri Brekumboðið. Mælt verður til at broyta uppskotið samsvarandi.

Tað seinna er tilnevningartilgongdin fyri umboð til nevndina.
Lógaruppskotið leggur upp til, at allir tilnevnandi partar helst skulu tilnevna fýra fólk, sum tey meta skikkað at umboða teirra øki. Í hesum sambandi skal fyri hvønn einstakan lýsast "... *útbúgving, førleikar og viðkomandi royndir [...], eins og í hvønn mun tey, ið mælt verður til, hava innlit í samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri nevndarinnar virki.*"
Kommunufelagið heldur hetta vera eina óneyðuga tunga skipan, serliga hjá smærri og sjálvbodnum felagsskapum.
Í útgangsstøði vil Kommunufelagið eisini varðveita frælsið at tilnevna tann ella tey, sum vit meta vera skikkað at umboða okkara felag. Hendan avgerð verður aloftast tikin av ovastu politisku leiðsluni í felagnum, sum vanliga raðfestir hvør skal vera okkara umboð og møguligt varaumboð.
Hesin tilnevningarháttur hevur søguliga verið virdur av landsstýrinum, og uppskotið eigur ikki at forða fyri at hetta kann halda fram.

Samanumtikið tekur Kommunufelagið fult undir við yvirskipaða endamálinum við uppskotinum. Men vit vilja staðiliga mæla til at skipa virksemið á ein meiri skynsaman hátt – bæði umsitingarliga og fíggjarliga.

Hetta gerst eftir okkara tykki best við at skipa virksemið hjá verandi stovnum og aktørum. Kommunurnar eru meiri enn sinnaðar at gera sítt til at fáa hetta at lukkast.

Vegna

Kommunufelagið

Tórbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri